# Trølla-húsini sum jólahús

Hvar Trølla-Pætur og omman búgva, munnu flestu børn í Norðoyggjum - og ivaleyst fleiri onnur við - vita. Tey munnu eisini vera mong, sum hava hugt at eyðkenda fjósinum úti í Geil, sum er nýtt í filmunum um trøllini. Men higartil hevur sum so ikki verið tað stóra at sæð hesum viðvíkjandi. Í øllum førum ikki, um ætlanin var at hyggja innar at síggja, hvussu tey bæði trøllini búleikast.

Nú skal tó vend koma í. Toymið handan Trølla-Pætur hevur í eina tíð arbeitt við ætlanum um at gera fjósið í stand, og higartil hevur vælvildin mótvegis ætlanunum verið stór.

- Vit hava tosað við Býráðið og Norðoyar Sparikassa, og frá báðum hava vit fingið at vita, at tey stuðla ætlanini 100%, sigur Niclas Heri Jákupsson.

Hann vísir tó á, at enn er ikki leyst og liðugt kortini.

- Vit mugu so eisini tosa við bóndan, sum varðar av økinum við fjósið. Og ikki minst, so mugu vit eisini finna eina loysn saman við Landsverkið. Verður ætlanin veruleiki, so verður jú talan um eitt stað, har nógv børn kunnu væntast at forvitnast, og so er tað óheppið, um nýggi ringvegurin liggur alt ov tætt at fjósinum, sigur Niclas Heri, sum tó tykist grammur eftir at sleppa ígongd.

- Vit hava so sett okkum sum mál, at húsini skulu standa liðug, tá Norðoyatunnilin letur upp. Altso 1. mai. Og so er jú upplagt, at húsini verða pyntað eyka nógv, tá høvi býðst. Eitt nú vit at gera tey til jólahús, tá tann tíðin aftur nærkast, sigur hann at enda.



*Fjósið verður ikki til jólahús í ár. Men gongst eftir vild, so verða Trølla-húsini í Geil heilt skjótt riggað til, soleiðis at vitjandi kunnu síggja, hvussu Omman og Trølla Pætur búleikast*

























